


## Kafé Blákrossstovan 10 ár

Tann 4. novembur eru 10 ár liðin síðan Kafé Blákrossstovan lat upp í Kongagøtu 8 í Havn. Blái Krossur rekur hesa kaféina sum eitt tilboð til núverandi og fyrrverandi rúsmisnýtarar og onnur, sum hava áhuga í einum rúsfríum stað, har tað ber til at keypa sær ein drekkamunn og okkurt afturvið. Eisini verður kaféin nógv brúkt, til at sita og práta í hugnaligu hølunum. Tað eru eisini møguleikar, um tað er ynskiligt at samrøðan skal vera í trúnaði, tí aftanfyri kafeina er samtalurúm.Seinastu árini hevur kaféin boðið eina ókeypis máltíð hvønn leygardag í vetrarhálvuni. Viðhvørt er tað suppa, men turr grind ella turrur fiskur verður eisini serveraður til stóra gleði fyri tey vitjandi.
Í samband við 10 ára dagin verður almenn móttøka í Kafé Blákrossstovuni í Kongagøtu 8 týsdagin 4. november frá klokkan 15 til 18.

# Minst líka dugnaligir sum danskir arkitektar



*- Trupulleikin er ikki at føroyskir arkitektar eru minni dugnaligir enn danskir. Statistikkurin vísur at føroyskar teknistovur gera færri byggigølur enn tær útlendsku, ið verða nýttar her, sigur Mayfinn Norðoy*

**– Føroyskir arkitektar eru minst líka dugnaligir, sum danskir, sigur Mayfinn Norðoy, formaður í Arkitektafelag Føroya. Hann undrast yvir, at føroyskir byggiharrar velja danskar teknistovur fram um føroyskar**

BYGGING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í gjár varð kunngjørt at eldradepilin, ið skal byggjast á trøðni hjá Júst Sivertsen yviri við Strond, er fallin danska felagnum Arkitema í lut at tekna. Hesin stovnurin er bara tann seinasti í røðini av fleiri nýbygningum, ið fella donskum fyritøkum í lut at tekna.

Mayfinn Norðoy, ið er formaður í Arkitektafelag Føroya, hevur áður funnist at føroyskum byggiharrum, ið velja danskar teknistovur framum føroyskar teknistovur.

- Trupulleikin er ikki at føroyskir arkitektar eru minni dugnaligir enn danskir. Statistikkurin vísur at føroyskar teknistovur gera færri byggigølur enn tær útlendsku, ið verða nýttar her. Hygg bara at millum annað Hoyvíkshøllini, har stórir trupulleikar vóru við takinum. Eisini eru fleiri onnur dømi um, at feilir verða gjørdir, har danskar teknistovur eru íblandaðar, sigur Mayfinn Norðoy.

### Størri merkir ikki betri

Tann veruligi trupulleikin er sambært Mayfinn Norðoy ikki at føroyskar teknistovur gera eitt verri arbeiði enn aðrar, men heldur støddin á føroyskum teknistovum, ið kanska ofta hava ilt við at fylgja við byggiharranum.

- Men tað er ein trupulleiki, ið lættliga kann loysast. Vit hava eisini teknistovur, ið telja upp í 16 fólk, og tá skuldi eingin trupulleiki verðið. Útlendsku teknistovurnar hava kanska upp móti 200 fólk í starvi, men hetta merkir ikki at tey seta so nógv fólk av til eitt arbeiði. Tær seta kanska ein bólk uppá 5 til 6 fólk av til at arbeiða við málinum, og tað er nakað vit eisini megna. Tað krevur bara nakað av byggiharrunum og arkitektunum, at teir seta seg niður saman og finna eina loysn, sigur Mayfinn Norðoy, formaður í Arkitektafelag Føroya.

Mayfinn Norðoy fýlist eisini á, at mann í niðurgangstíðum velur at senda, í hesum førinum fimm, milliónir krónur av peningi hjá skattaborgarunum av landinum.



*Mynd úr uppskotinum hjá Arkitema ið vann kappingina*

# Alt farið rættvíst fram

**Forkvinnan í sosialu nevnd hjá Tórshavnar býráð vísir aftur, at kommunan tilvitað velur danska fyritøku framum føroyska. – Alt er farið rættvíst fram, sigur Halla Samuelsen, forkvinna**



*Øll uppskotini hava fingið somu viðgerð, og dómsnevndin valdi besta uppskotið burturúr mongdini á mest rættvísa hátt hugsandi, sigur Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd*

BYGGING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Sambært forkvinnuni í sosialu nevnd hjá Tórshavnar býráð fór alt rættvíst fram, tá uppskotini um nýggja eldradepilin, ið skal byggjast á trøðni hjá Júst Sivertsen yviri við Strond, vórðu viðgjørd.

Innkomin vóru fimm uppskot um at byggja eldradepilin, og tey fingu øll somu viðgerð.

- Vit fingu fimm uppskot inn, og tey vórðu so øll hongd upp og viðgjørd. Dómsnevndin visti ikki hvør átti hvat uppskot, meðan vit viðgjørdu uppskotini. Tey fingu hvør sítt nummar, og síðan gingu vit runt og hugdu eftir uppskotunum og góvu teimum stig, alt eftir hvussu góð vit mettu tey vera, sigur Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd hjá Tórshavanr býráð.

### Øll somu viðgerð

Útfrá teimum krøvum, ið vórðu sett til nýggja eldradepilin, gav dómsnevndin innkomnu uppskotunum stig. Tey stigini vórðu givin útfrá millum annað hvat tilfar verður nýtt, um svimjihylur var við, parkeringsviðurskiftum og kostnaði.

- Vit ynsktu eisini at íbúðirnar skuldu venda út móti Nólsoyarfirði, og tað vóru ikki allar, ið gjørdu tað. Haraftrat var okkurt uppskot í tveimum hæddum, og tá hugsaðu vit millum annað um starvsfólkini, vísir Halla Samuelsen á.

Tá uppskotini vóru liðugt viðgjørd, vórðu stigini tald saman, og tað uppskotið við flest stigum, gjørdist vinnarin.

- Tá kundu vit síðani lata brævbjálvan upp og finna útav, hvør átti besta uppskotið, og tað vísti seg so í hesum førinum at verða eitt danskt felag, nevnliga Arkitema. Sostatt hava øll uppskotini fingið somu viðgerð, og dómsnevndin valdi besta uppskotið burturúr mongdini á mest rættvísa hátt hugsandi, sigur Halla Samuelsen, ið er forkvinna í sosialu nevnd hjá Tórshavnar býráð.

Fimm milliónir krónur eru settar av komandi ár til at projektera eldradepilin, umframt at nevndin hevur samtykt eina fimm ára ætlan, har 38 milliónir verða settar av til økið næstu fimm árini.